# Kjak



**Elin N. W. Tausen**
*Samstarv.org*

## Heimsins besta samfelag ella …?

»Visjónin er, at Føroyar í 2015 verða millum bestu lond at virka og liva í. Vit ynskja, at Føroyar skulu verða eitt samfelag við strekum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar sosialar skipanir tryggja okkum eitt virðiligt lív. Skulu vit røkka hesum máli, er neyðugt við greiðum og framsóknum ætlanum« (Visjón 2015 – Mál og vegir, 2007)

Líka greið, sum visjónin hjá táverandi samgongu var á Ólavsøku 2005, líka greið er tann nýggja visjónin, sum núverandi samgonga hevur sett sær, at landskassahallið skal verða burtur í 2015, also á null! Tað er eisini ein góð visjón at hava, men samstundis sum man setti nógvar bólkar at útgreina visjónina »Heimsinis besta land«, so er ongin, sum kannar hvørjar avleiðingarnar vera av visjón »Null«. Hvørjar vælferðartænastur skulu ikki vera at bjóða føroyingum? Hvørjar verða avleiðingarnar fyri vælferðarsamfelagið, ella skulu vit hava eitt vælferðarsamfelag? Kunnu vit ikki liva við einum halli, meðan vit bíða eftir at inntøkusíðan veksur aftur…. ella skulu vit til at endurbyggja vælferðina, tá vit aftur hava yvirskot?

Vit hava tørv á politikarum, sum síggja møguleikar fram um forðingar! Sum ikki bert sita og eru afturlítandi, og grenja um tað, sum var. Sum gremja seg um ein niðurskurð av blokkinum fyri 10 árum síðani, samstundis sum somu politikarir hava sitið við ábyrd, meðan risastóra landskassa yvirskotið er vent til eitt risahall. Bara tí vit hava politikarar, sum ikki hava torað tikið neyðugu avgerðirnar fyri at fremja visjón 2015 í verki. Vit mangla politikarir, sum vilja taka ábyrgdina av at vera landspolitikarir, og sum hugsa um hvat tænir landinum best, og ikki hvat tænir sær sjálvum til næsta val!

Skulu fakfeløgini ikki vísa samfelagssinni og slaka í lønarkrøvum í ringum tíðum? Stutt sagt NEI! Fakfeløgini hava ikki ábyrgd av hvussu fíggjarpolitikurin verður førdur! Fakfeløgini eru til fyri sínar limir, og er endamálið at bøta um lønar og sáttmála korini hjá sínum limum. Í eini tíð har landsins politikur bert snýr seg um at økja um avgjøld og annan kostna fyri einstaka borgaran, er tað skyldan hjá fakfeløgunum at betra um lønarviðurskiftini hjá limunum. Pástandurin um, at tey alment løntu eru tey ríku í samfelagnum heldur ikki. Ein tann lægst lønti lønarbólkurin í Føroyum eru hjálparfólkini á dagstovnum, sum á fyrsta lønarstigi hava tað lægstu tímalønina sambart nøkurum sáttmála her í Føroyum… og tað sigur ikki so lítið.

Fakfeløgini gera rætt, tá ið tey standa fast við útsøgnina: Vit krevja nakað og vit fáa nakað. Einki annað kann góðtakast.



**Nicolina Dahl**
*Felagið fyri hoyribrekað*

## Steinur oman á byrðu

Týsdagin 9. november samtykti Løgtingið endaliga, at brúkaragjald skal leggjast á øll hoyritól. Líka til tað síðsta vónaðu vit, at vit og skil fór at rína við á tingi, men so varð tíverri ikki.

Samtyktin í dag brýtur við alla siðvenju á heilsuøkinum. Tann, ið hevur brúk fyri heilsuverkinum, eigur at fáa ókeypis hjálp. Men vit, ið eru hoyribrekað, eru nú minni verd enn øll onnur. Vit skulu sjálvi gjalda fyri ta hjálp, vit skulu hava. Tað er mannamunur so tað forslær og tað er ilt at skilja, hví vit hava uppiborið at vera soleiðis viðfarin.

Vit kunnu ikki gera við, at vit fingu hoyribrek at bera. Ongin okkara hevur biðið um brekið og enn minni ynskt tað. Nógv okkara fáa tað av arvaligum orsøkum, meðan onnur fáa hoyrn sína skadda av gangi. Tey, sum dagliga starvast í nógvum gangi, eitt nú maskinmenn, flakakvinnur og pedagogar, hava tænt samfelagnum við sínum arbeiði og hava ofrað sína hoyrn, men samfelagið vil ikki veita teimum hjálp. Tað er so órættvíst, sum tað kann vera.

Og bíða bara – ein armóðin rættir aðrari hondina. Tá hetta gekk í gjøgnum, at vit skulu gjalda fyri okkara hoyritól, hvør er tá tann næsti til at eiga tørn til brúkaragjald?

Sum hoyribrekað fær ein dyggar lúsingar í lívinum, men nú hava vit fingið fíggjarligan lúsing á hin vangan. Tað máttu landsins kosnu ikki komið sær.

Frammanundan eru vit, sum brúka hoyritól, nóg hart rakt. Vit hoyra ikki fuglasangin ella áartutli, ikki smábørn tosa, ikki útvarp ella sjónvarp (men fult kringvarpsgjald skulu vit kortini av við), vit hava ilt við at taka lut í familjuveitslum og øðrum samkomum, hoyra ikki prædikur ella talur, ikki sjónleik og skemt, ikki sang og tónleik og klára ikki væl at fylgja við í samfelagskjakinum.

Hoyritólið er lívlínan – uttan tað er hjálparloysi og einsemi.

Hoyritólið gevur okkum møguleika fyri at vera verandi virknir samfelagsborgarar.

Hoyritólið er so sanniliga ikki til pynt!

Tænastan til hoyribrekað her á landi er á lægst hugsandi støði. Har kundu nógvir batar verið, men vit fáa bara afturstig. Tað má sigast at vera sera hugstoytt. Har fingu vit hoyribrekaðu stein oman á byrðu.

## Spurningur til Jóannes Eidesgaard

Eg havi hoyrt teg sagt í fjølmiðlunum, at ávísir bólkar í samfelagnum ikki gjalda skatt í Føroyum, tí teir virka undir skipanum sum: DIS, FAS, NIS og NOR.

Sjálvur eri eg ein av teimum, ið kemur undir hesar bólkarnar. Havi siglt undir DIS, FAS, NIS og NOR síðani á heysti 2000, og havi eg goldið skatt í Føroyum til føroyska landskassan undir FAS, NIS og NOR eftir føroysku skattalógini.

Eg fái javnan skotið í skógvarnar, at eg ikki gjaldi skatt í Føroyum, og tí ikki skal siga mína hugsan um samfelagsmál o. a.

**Spurningurin frá mær er:**
Gjaldi eg óneyðugan skatt í Føroyum, ella er tað tú, ið sigur ósatt fyri Føroya fólki?

*Við skattakvøðu*
**Einar Vang, Skipari, Bourbon Offshore**



**Brandur Sandoy**
*Sandi*

## Aftur í óføri

Las áhugaverda grein hjá Eyðgunn Samuelsen, har hon kemur við boðum uppá, hvussu samfelagið framyvir skal fáa endarnar at røkka saman fíggjarliga.

Samfelagið Føroyar valdi fyri rúmari tíð síðan, at basera alla vælferð uppá skatt av lønarinntøkum. Ein skipan, sum vit hava arvað frá teim undanfarnu, og sum í teirri tíðini kundi brúkast, til at byggja vælferðarsamfelagið upp við.

Nú eru vit komin so mikið langt, at vit vænta øll at samfelagið tekur um endan, um vit gerast sjúk, um ikki brúk er fyri okkum á arbeiðsplássinum longur, ella vit gerast ov gomul til at vinna okkara egna livibreyð.

Politiska skipanin hevur skapt eina eftirlitisskipan, sum skal tryggja at ongin snýtir nakran, at ongin skal sleppa at lata eina vøru út til brúkaran, uttan eftirlit í høvd og reyv, at ongin skal verða betri fyri enn ein annar. Alt byggir uppá reinan javnaðarpolitikk, har øll skulu verða líka fyri, og ongin skal fáa nakran fyrimun framum onnur.

Tað er henda skipan vit í dag síggja kollsigla. Eftirlitið kostar so nógv, at skipanin ið javnaðarflokkurin hevur verið garantur fyri, ikki longur hevur ráð at fíggja kostnaðin, ið stendst av sama eftirliti. Alt skal í dag fíggjast yvir skattin, so at tey sum gera ein minni innsats, kunnu njóta somu ágóðar sum tey, ið veruliga er grundstuðlarnir undir samfelagnum, og bera okkum øllum uppi.

Alt sum eitur landspolitikkur, byggir í dag uppá eina parodi, har øll taka upp eftir øðrum, at vit mugu lesa okkum úr kreppuni ið er íkomin. Sannleikin er, at øll í tí politiska rúminum krympa tærnar fyri, hvar sparingarnar raka næstu ferð landsfíggjarætlan skal leggjast, og bara av einari grund: tí at skatturin av lønarinntøkunum ikki strekkir til.

Undrunnarvert er at politikarar hava mist orienteringina, og vita ikki hvør rættningur ber framá. Meiri undrunnarvert er, at polittikarar sýnast eisini hava gloymt, úr hvørjum rættningi vit eru komin. Tað tykist eins og ongin politikari torir at viðurkenna, at fiskivinna og partvís alivinna t.v.s tilfeingið, er tað sum hevur borið okkum uppi, sum ber okkum nú, og sum kemur at bera okkum fleiri ár fram í tíðina.

Tí er tað altavgerðandi, at landspolittikarar taka annað skinn um bak, og gevst við at billa fólki inn, at vit í Føroyum kunnu liva av at klippa hvør øðrum. Fleiri vinnur eru við at fara fyri bakka, millum aðrar búnaðarvinna, ferðavinna, fiskivinna, tí at tit sum taka tær politisku avgerðirnar her á landi, ikki hava dirvi at skapa karmar til hesar vinnur at arbeiða undir.

Antin mugu tit finna útav at repa umsitingarligu seglini á skútuni Føroyar, ella mugu tit finna onnur veiðumið, tí skatturin av lønarinntøkunum eina, kemur ikki at bera allar byrðarnar framyvir.